## DAGSINS MEINING

# Vælkomin

Tað er í tí smáa at vit skulu síggja tað stóra. Hetta eru orð, sum mong av okkum hava sannað ella koma til at sanna. Í frálíku ítróttarsendingini í SvF mánakvøldið var samrøða við dana, sum hevur ætlan um at flyta til Føroya. Maðurin, sum hevur verið í Føroyum fleiri ferðir eitt nú sum talvdómari, hevur fingið alsk til landið og fólkið her og bjóðar seg fram sum talvvenjara við serligum atliti til tey ungu og uppvaksandi ættarliðið.

Sambart sendingini í sjónvarpinum vil hesin danski talvvenjarin og dómarin fegin brúka sína frítið til at hjálpa ungum føroyingum at gerast dugnaligir telvarar. At skapa áhuga fyri hesum spæli, sum er so nógv annað eisini. Hann heldur talvítróttina vera einastandandi til ikki minst føroysk viðruskifti, har tú oftani úti á útoyggj ella á plássum, har tað ikki eru umstøður fyri øðrum ítrivum, tørvar nakað at tríva í í tíni frítíð. Og her kemur so eginleikin við talvspælinum til sín rætt.

Føroyskt talv hevur ment seg nógv seinastu árini og er nógv gjørt fyri at menna hetta ítrív. Eitt nú vitjaði ein av størstu telvarum nakrantíð, russiski meistarin, Kasparov, oyggjarnar. Ein gestus og ein hending, sum vissuliga eigur rós uppiborið. At ein danskur talvvenjari nú fegin vil geva sítt íkast til at menna hesa ítótt og henda mentanararv er kærkomið og skal hann vera vælkomin henda vegin.

Kann slíkt sum hetta vera við til at skapa áhuga millum tey ungu fyri talvspælinum, so kunnu vit bara fegnast um tað. Eitthvørt stig, sum er við til at fáa okkara ungu at vísa áhuga fyri sunnum og góðum ítrivum,er kærkomið. Antin tað so snýr seg um fótbólt, hondbólt ella talv. Men nettupp tann sannroynd, at talv er eitt ítrív, sum ikki krevur stórar íløgur, nógv fólk ella nógva fyrireiking, ger, at eitthvørt stig, sum kann menna hesa ítróttina, eigur at vera væl móttikið. Fjølbroytni og áhugi eru lyklaorð, sum vit eiga at leggja okkum í greyma, eisini tá vit tosa um ítrív, ítrótt og mentan sum heild. Hesi bæði hugtøk eiga at standa frammaliga hjá okkum øllum og ikki minst teimum, sum skipa fyri í tí smáa sum í tí stóra.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Føroyar, fakfeløg og fremmandafólk

**Høgni Hoydal**



Í øllum rokinum um útlendingamál í Føroyum, má tað standa øllum greitt, at vit eiga at taka ábyrgd av útlendingamálum í Føroyum.

Ongin tykist at hava ábyrgdina og veruliga innlitið í málini um útlendska arbeiðsmegi í Føroyum. Bæði politiska viðgerðin og orðalagið í fjølmiðlum ber nú týðiliga brá av, at stórur mannamunur verður gjørdur. Tað er óvirðiligt og mannminkandi at hoyra, at til dømis Føroya Arbeiðarafelag sigur seg ikki vilja taka hond um sínar limir í Skálavík, tí teir eru útlendingar.

Í mínari flaggrøðu í Kollafirði segði eg m.a. hetta:

"Merkið okkara má ímynda mannarættindi og javnbjóðis virðing fyri øðrum. Annars verður Merkið innantómt og fer bara at snúgva seg um okkum sjálv. Tá fer Merkið ikki at ímynda tjóðskap, men tjóðskaparí.

Og eg skal erliga viðganga, at eg gerist als ikki errin av føroyskum tjóðskaparvirðum, tá eg hoyri um fremmandafólk í Føroyum, ið verða viðfarin sum kríatur og har føroyskir fakfelagsleiðarar tosa um tey, eins og vóru tey verri fólk enn føroyingar.

Tað eru eisini slík virðir, ið Merkið kemur at umboða, um vit ikki tala at og broyta hesa framferð."

Eg vil staðiliga mæla til, at tann avtalan, sum undanfarna landsstýri gjørdi við danska ráðharran í útlendingamálum, verður sett í gildi.

Hon snúði seg bæði um eina smidliga og greiða skipan fyri ítróttarfólk og um greiðar mannagongdir fyri aðra útlendska arbeiðsmegi, so forðast kann fyri skipaðum menniskjahandli, lønardumping og ójøvnum rættindum á arbeiðsmarknaðinum.

Og eg vil staðiliga mæla til, at arbeiðið at yvirtaka málsøkið útlendingamál, heldur fram.

# Savnið sum hvarv

**Hergeir Nielsen**



Jacob Vestergaard er komin við enn eini frágreiðing um savnið, sum hvarv, og tað eru ikki hissini undanførslur og skuldsetingar har eru. Ein seinasta rættleiðing er tí neyðug í hesum sambandi.

Sjálvur var eg við at gera avtaluna um skúlapakkan í síni tíð, og um at leggja miðnámsskúlan og sjóvinnuútbúgvingina í Hovi.

Skúlin endaði í Vági nøkur ár seinni, tá posthúsið har varð umbygt, og lokalpolitisk søga varð skrivað, tá sjóvinnuútbúgvingin samstundis varð flutt til Klaksvíkar.

Hesum átøkum átti eg ongan lut í.

Vit kliptu ongar snórar 1998-2004, heilt einfalt tí Suðuroyggin ikki var við á politiska Føroyakortinum árini frammanundan. Hetta skeiðið, sum var kemiskt reinsað fyri allar íløgur og allar ætlanir, hóast ikki færri enn fimm kvinnur og menn úr øllum hinum flokkunum umboðaðu oynna i samgongu.

Í 1998 komu vit so í stjórn, og saman við okkum ein long røð av íløgum í Suðuroynni

Vit fingu skjalfest eina dagføring av sambandinum við Suðuroynna, og vit fingu vit raðfest eina bygging av miðnámsskúla saman við tveimum havnaløgum á Trongisvágsfirði og Vági, einum tunnli, vegabreiðking í Hvalba og bakkaverju í Sumba.

Einki annað valdømið fekk nær námindi líknandi sømdir, sum vit fingu við einum manni í samgongu.

Ráðini frá Jacobi Vestergaard um mín tørvandi samstarvsvilja eru tí ikki annað enn rein øvund og ómegd. Illkynjaðu søgur hansara um, at eg bara havi tænt einum ávísum øki, sláa seg sjálvar frammaná.

Hinvegin, so verður framvegis leitað um okkara leiðir eftir onkrum smávegis eftir Jacob Vestergaard sum landsstýrismanni, men enn er einki komið undan kavi.

**Løgtingssamtyktin**

Tá miðnámsskúlin kom á tingborð, varð uppskot um at gera meginbókasavn upp í skúlan samtykt. Ein leistur, sum ma. varð nýttur í Noregi við góðum úrsliti, og sum lærarar skúlans fegnaðust um.

Eitt samt løgting samtykti hetta projektið, og breið semja var á tingi um, at hetta var eitt sera skilagott framtak fyri Suðuroynna, ungdómin og mentanarlívið um okkara leiðir.

Landsstýrismaðurin helt, at ein nýggj politisk viðgerð av at leggja skúlan aðrastaðni, hevði elvt til, at málið datt heilt burtur.

Hvørki á tingi, í samgongu ella andstøðu, ella úti í almenniginum sást ella hoyrdist onnur hugsan um málið.

Fyrstu ferð vit varnaðust andróðurin móti projektinum var á fundi í Øravík, har Jacob Vestergaard segði seg vera ímóti ætlanini um meginbókasavnið. Hetta var aftan á, at málið varð samtykt á tingi.

Andróður sín váttar sami maður í grein síni i Dimmalætting 16. apríl, har hann sigur seg hava onnur og hægri prinsipp

*Framhald á næstu síðu*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Viðv. teilendingum í Skálavík

**Hendrik Tausen**
*Skálavík*

Rætting til skriv í Dimmalætting og Útvarpinum um teilendingarnar í Skálavík. Við vón um at Dimmalætting og Útvarpið vilja hava tað, sum sannari er.

**Ongan góðan**

Dimmalætting sigur, at teilendingarnir í Skálavík ongan góðan eiga. Teilendingarnir eiga ongan góðan á Dimmalætting. Tey eiga nógvar góðar aðrastaðni, serliga í Skálavík. Hví kunnu tit ikki tosa við tey, sum hava okkurt gott at siga? Hví vildu teir báðir, sum vóru í Skálavík fríggjadagin 23/04 ikki tosa við borgarstjóran? Passaði tað ikki til tíðindini, um hann hevði okkurt positivt at siga? Teir gingu framvið honum, har hann stóð og arbeiddi uttan fyri fiskavirkið, hóast eg hevði sagt teimum, at hann stóð har.

Hvat hevur Randi Jacobsen fyri sær, tá ið hon skrivar um hungur hjá teilendingunum í Skálavík? Hvar er tann granskandi journalistikkurin? Heldur Randi Jacobsen veruliga, at tað bert handlar um at selja blaðið? Veit hon ikki, at hon skrivar um fólk? Fólk hava sál. Tað er faktiskt ein beistagerð, sum hon ger við hasum fullkomiliga óváttaðu tíðindunum. Hatta vil eg kalla, at journalisturin skeyt seg í fótin.

**Útvarpið**

Tá ið so Útvarpið í tíðindasending fór í smiðju hjá Dimmalætting og velur alt tað negativa burturúr, og gevur tí eina umdreyðing aftrat til ta skitnu síðuna, tá fallast mær hendur. Hví ikki spyrja onkran í Skálavík, hvat ið gongur fyri seg har? Er tað virkuliga so, at er bert sleyg og slatur, sum eru góð tíðindi?

**Fakta um teilendingarnar**

Hvat er so fakta um teilendingar í Skálavík? M.H. Export, sum er arbeiðsgevari hjá teilendingunum, flutti frá Lopra til Skálavíkar summarið 2003. Virkið átók sær at royna at fáa flakavirkið har at koyra. Royndin stóð frá fyrst í juni til seinast í November, tá vit noyddust at steðga, orsakað av trupuleikum i at sellja upsa.

Vit ásettu okkum beinanvegin at kanna aðrar møguleikar, fáa fleiri í part við okkum og fáa fígging til hetta. Vit spurdu teilendingarnar um teir vildu vera við í hesum, tí treytin fyri at flakavirkið í Skálavík kann virka er, at serliga teir eru við. Tað er ikki arbeiðsfólk til staðar í Skálavík til at manna virkið. Tað er roynt fyrr, men mislukkað. Nakrir fóru til Teilands at bíða, meðan aðrir søgdu seg fúsar ar bíða her. Hendan roynd okkara at fáa virkið at koyra, hevur tikið meiri tíð enn vit roknaðu við. Í skrivandi løtu eru vit komnir í gongd.

Tað undarliga, sum hendir fyrsta dagin, ið teilendingarnir eru til arbeiðis, er at Dimmalætting skrivar um hungur og neyð í Skálavík. Alt skrivið byggir á slatur og sleyg.

Hvat er galið við at fara á seiðaberg? Kann tað ikki vera, at onkur heldur tað vera stuttligt? Eg royndi at forklára blaðmanninum, hvørjar siðvenjur teilendingarnir hava, tá tað snýr seg um mat. Eg helt fakt-iskt, at føroyingar vóru so upplýstir og sigldir, at teir kunnu skilja, at tað í dag finst ein onnur verð uttan fyri Føroyar. Blaðmaðurin vendi tí, sum eg segði fullkomiliga á høvdið. Tað, sum eg royndi at siga var, at tveir triðingar av tí sum teilendingarnir eta er rís. Teir eta rís og onkran kjøtella fiskabita afturvið á morni, døgurða, seinnapart og sama á kvøldi. Hetta er teirra siðvenja og hví kunnu teir ikki hava hana? Hví skulu heimføddir journalistar fáa hetta til nakað annað?

Eg eri vísir í, at teir flestu føroyingar kunnu síggja, at hetta má vera ein bíligur máti at liva uppá. Tað var tað sum eg fortaldi, at forbrúkið var umleið 1500 kr/mðn. Eg segði eisini útrykkiliga, at tey betaltu onga leigu meðan einki arbeiði er.

Tað er ein matvøruhandil í Skálavík, hví hevur ikki verið spurt har, um teilendingarnir eru kundar har? Eg kann upplýsa tað, sum eg hoyri í bygdini um, at tá tað er tilboð t.d. uppá høsnarungar og fleskasteikir, tá skulu skálvíkingar vera skjótir um teir skulu fáa nakað, tí teilendingarnir tøma kølidiskin.

Tað er ymiskt annað, sum teilendingunum dáma væl at eta. T.d. Høggislokk og makrel. Tá hetta verður nevnt hugsar onkur kanska, hvat hetta er fyri nakað. Hetta er jú agn, men úti í tí stóru verð er hetta jú luksusmatur. Neytavembur kosta nógvan pening í Teilandi. Innmat yvirhøvur úr neytið verður blakað burtur av føroyingum. Av hesum kann siga, at tað er bíligt hjá teilendingum at búgva í Føroyum. Tað ger akkurát tað sama um tey hava lítið arbeiði ella nógv arbeiði forbrúkið eru tær somu 1500 kr/mðn.

Tað kann upplýsast, at hesir 17 teilendingarnir tjentu í 2002 og 2003 ca. 3,500.000 milliónir. Eg haldi, at tað eru nógvir arbeiðsleysir føroyingar, sum hava tað verri enn hesir teilendingarnir.

Hesi skriv, sum hava verið nú í langa tíð um teilendingarnar í Skálavík, er ein forfylging og niðurgerð av teimum. Tey skilja als ikki hví, og tey vita ikki um tey hava gjørt nøkrum nakað.

Eg eri púra vísur í, at tey flestu í Skálavík eru samd við mær í, at hetta er fitt fólk og eru ongum til fortreð. At tey eru bangin og steingja seg inni er forferdiligt tvætl. Tað einasta, sum allir her vilja er, at fólkið fær frið. Eitt er at skriva til at selja bløð, eitt annað er at niðurgera útlendingar. Tað kann væl koma aftur um brekku.

Eg stóli fullkomliga uppá, at Skákavíkar Kommuna sær til, at teilendingarnir ikki líða neyð.

*Framhald av síðu 10*

enn løgtingið um hetta mál, hesuferð sum form. í Føroya Kommunufelag.

Á hesum fundi heitti eg á kommununar um at vera við í hesum átaki til gagns fyri ungdóm okkara. Annað samskiftið havi eg ikki havt við kommunurnar um hetta mál, sum varð hildið at vera eitt so gott tilboð, at ikki bar til at siga nei til tað..

**"A window of oppertunity"**

Í politikki er tað soleiðis, at neyðugt er at taka av, tá gluggar lata seg upp, og møguleikar eru í eygsjón. Soleiðis er tað úti í heimi, og soleiðis er tað heima hjá okkum.

Vit høvdu eitt fyrsta floks projekt til ungdómin í Suðuroynni, og vit fingu tað enntá samtykt á tingi. Kommunurnar partur var so lítil, at hann var til at liva við hjá øllum.

Vit høvdu ein fugl í hondini, ein gyltan møguleika, men nú er fuglurin flogin, og projektið er dottið niðurfyri.

Jacob Vestergaard kann tí í dag fegnast um teir 10 á takinum, og ikki so ógvuliga nógv annað.

Tá málið var komið á tingborð var skilaleyst at gera annað enn at stuðla eini skilagóðari íløgu í Suðuroynni av fullum og heilum huga, og ikki ein maður fyri norðan ivaðist í, at lokalsamfelagið at enda fór at taka ímóti tilboðnum.

Tástani, tá suðringar høvdu fingið alt borið á silvurfati, sóust fleiri av teimum hava aðra meining um projektið, hvar tað heldur skuldi ligið, hvussu tað heldur skuldi verið skipað og so frameftir.

Jacob Vestergaard sigur seg hava virkað eftir sínum prinsippum um ábyrgdarbýtið millum land og kommunu, og hevur havt fleiri fyrivarni í hesum máli.

Hann hevur so eisini í dag síni óskalaði prinsippir í varðveitslu, men heldur ikki so nógv annað at sita og kóla uppiyvir.

Hann heldur ma., at vit í tjóðveldisflokkinum afturat einum miðnámsskúla í Suðuroynni fyri 45 mió.kr. saktans kundu havt bygt eitt meginbóksasavn samstundis aðrastaðni í Suðuroynni.

Ikki er gott at vita hvørji politisku verð hesin maður livir í. Fólkaflokkurin roydni saman við andstøðuni at boykotta miðnámsskúlan og at fáa ein skúla í Havn fram um okkara.

Hetta miseyðnaðist jú, sum vit øll minnast.

Hesin flokkur situr nú á málinum, og suðringar kunna bíða til dómadags eftir, at Jacob Vestergaard fer at byggja teimum eitt meginbókasavn eftir sínum heilt serligu prinsippum.

**Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum**

Jacob Vestergaard reypar av, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ikki forðaði fyri, at miðnámsskúlin varð lagdur fyri tingið.

Fyrr var illa. Hvussu hesin landsstýrismaður annars gagnaði suðringum soleiðis heilt á egnari hond, tá hann vóð í møguleikum, kundi verið áhugavert at fingið nakað nærri at vita um.

Nei, talan er á ongan hátt um nakað brigsl frá míni síðu.

Talan er um at draga viðgerðina saman við grundgevingunum av einum máli, sum er mist á gólvið, fram í ljósið, so at borgarin, í hesum føri suðringar, fáa at vita, hví hesin bitin varð tikin av borðinum aftur.

Demokratiska orðaskiftið eigur eisini at tola, at persónligar støðutakanir í kommunalum politikki síggjast aftur, og ikki haldi eg meg hava gingið nøkrum ov nær í so máta.

Jacob Vestergaard sigur ferð eftir ferð, at eg bara havi virkað fyri ávísum plássi í Suðuroynni. Hetta er jú beinleiðs ósatt, og her er talan um veruligt brigsl í orðsins sanna týdningi.

Fyri at vinna sær sjálvum politiskan tokka, setur hann her bygdir upp móti hvørji aðrari. Hetta er nakað av tí útssaligasta, sum finst, serliga tá hugsað verður um, at einar 5-600 mió.kr. eru játtaðar kring alla oynna farna skeiðið.

Eingin ivi er um, at maðurin hevur ilt av onkrum, sum komi er til Vágs, og verður Jacob Vestergaard tí alment spurdur, hvat tað er, sum er komið til Vágs, sum ikki skuldi verið komið hagar?

Lærararáðið

Eitt meginbókasavn knýtt at einum miðnámsskúla var eitt serligt hugskot, sum kom úr erva.

Ivi var millum lærarar og onnur, um hetta nú var tað rætta, men hesin ivi varð skjótt lagdur aftur um bak, og hugskotið vann frama.

Lærararáðið hevur ikki samtykt at vera ímóti meginbókasavninum, hetta er beinleiðis ósatt.

Hetta er ein søga, sum Jacob Vestergaard hevði brúk fyri, og sum hann hevur brúkt til at tæna sínum oyðandi endamáli við.

Heldur hann fast um hesi lodrøttu ósannindi, skyldar hann okkum at siga nær, hvar og hvussu hendan samtyktin er tilevnað, hvussu hon ljóðar, og hvagar hon er send?

Um fakliga grundgivin andstøða og ræðsla fyri bókum og søvnum skuldi komi frá skúlanum sjálvum, var hugsandi, at onkur fjald dagsskrá var eitt nærri eftirlit verd, heldur enn bókabálið, sum Jacob Vestergaard gjørdist talsmaður fyri.